ítróttur

Føroyar-Grikkaland



Abraham Hansen – her í dysti við Toda Jónsson undir venjing – hevur føroyska liðforskiparabindi, tá landsliðið fer á vøllin í kvøld móti Grikkalandi **Mynd: Hilmar Jan Hansen**

Abraham fingið liðskiparabindið

Veteranurin tekur uppgávuna sum miklan heiður og stóra avbjóðing

Abraham Hansen er liðskipari á landsliðnum hjá Allani Simonsen. Hann stóð við endan í dystinum móti Vejle síðsta mikukvøld, og tí var tað ikki óvæntað, tá Allan Simonsen á pressufundinum mánakvøldið kunngjørdi, hvør nýggi liðskiparin er.

Hví hevur tú valt júst Abraham Hansen?

– Tað eru tað fleiri orsøkir til. Fyri tað fyrsta er tað týdningarmikið at hava liðskipara, sum hevur nógvar royndir, og tær hevur Abraham. Hann er ein góður fótbóltsspælari, og so hevur hann tann týdningarmikla leiklutin fyri ein liðskipara, at hann gongur altíð frammanfyri og gevur seg fullkomuliga fyri uppgávuni, metti landsliðsvenjarin.

Glaður og stoltur

Abraham Hansen dylir ikki fyri, at hann tekur nýggju uppgávuna sum stóra avbjóðing og ein heiður:

– Tað er ein álitisváttan frá venjaranum at vera útnevndur til liðskipara, og so stendur tað upp til mín at vísa, at eg megni at liva upp til álitið. Í hvussu so er fari eg at gera mítt besta í kvøld. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað ber.

Nær fekk tú at vita, at tú skuldi verða liðskipari?

– Tað var undan dystinum móti Vejle, at venjarin segði mær, at eg skuldi hava bindið í tí dystinum og eisini í dystinum móti Grikkalandi.

Hinir liðformenninir

Á ferðini í Eysturríki og Danmark fyrr í summar royndi Allan Simonsen fýra leikarar sum liðskiparar: Magni Jarnskor, Abraham Hansen, Óli Johannesen og Tummas Eli Hansen.

Jóannes Jakobsen hevur annars verið sjálvskrivaður í tí starvinum í langt ára mál. Men hann var ikki liðskipari í fyrsta altjóða landsdystinum. Tá hevði Jóannes Jakobsen givið avboð saman við hinum HB leikarunum, og tí var tað Kristian Petersen úr ÍF, sum fer í søguna sum fyrsti liðskipari eftir at føroyskur fótbóltur hevði fingið altjóða góðkenning.

-nn-

Kring landsliðið

Tá landsdystir verða leiktir, eru tað sjálvsagt mest leikararnir og venjarin, sum eru frammi í fjølmiðlunum. Men tað ber ikki til at hava venjingarlegu uttan at tað eru fleiri onnur, sum gera sín setning. Vit hava hugt eitt sindur at, hvørji tey eru, sum syrgja fyri, at alt gongur sum tað skal á Svangaskarði.

Tað hevur eisini verið eitt sindur av útskifting í fólkinum kring landsliðið. Jákup Simonsen, sum trúliga hevur verið liðleiðari hjá besta landsliðnum í øllum dystunum síðani 1984, er ikki í tí starvinum longur. Í staðin fyri ein liðleiðara hevur Allan Simonsen ein hjálparavenjara aftur at sær. Og tað er framvegis í familjuni Simonsen. Petur Simonsen verður við síðuna av Allani Simonsen í kvøld.

Undan og eftir hvørja venjing hevur vøddamýkjarin Hjørleif Niclassen leikararnar til viðgerðar á briksuni, og undir dystunum eru tað Jóhan Petur Davidsen ella Jákup Midjord, sum hava læknaligu ábyrgdina.

Petur Elias Petersen er ognarrøkil. Tað vil siga, at hann skal syrgja fyri, at tað, sum skal brúkast í sambandi við venjingina er tókt, t.d. bóltar og keylur, og hann skal syrgja fyri, at klæðini eru í lagi.

Nú leikararnir hava verið saman, hava teir etið høvuðsmáltíðirnar á Svangaskarði. Har eru tað toftakonur, sum stákast undir leiðslu av Torborg Hansen.

FSF umsitingin hevur býtt uppgávurnar millum sín soleiðis, at Julian Eliasen tekur sær av fremmanda gestunum. Hann var á flogvøllinum, tá teir komu í fyrradagin, og hann fylgir teimum, til teir fara avstað aftur.

Ísak Mikladal tekur sær av samskiftinum við føroyska hópin. M.a. hevur hann alt samskifti við Allan Simonsen, og tað er hann, sum syrgir fyri, at leikararnir fáa boð, og at teir hava tey tingini við sær, sum venjarin ynskir, at teir skulu hava.

Í brævinum, leikararnir fáa sendandi undan hvørjari venjing og hvørjum dysti, verður nágreinilig ætlan løgd við fyri tíðina, landsliðið er saman. Sambært ætlanina hesa ferð, so verða leikararnir vaktir í morgun klokkan 8. Klokkan 8.30 eta teir morgunmat, og teir venja á Svangaskarði klokkan 10.15. Eftir venjingina eta teir ein bita, og klokkan 13.15 stendur hvíld og vøddamýking á skránni.

Taktikfundurin verður klokkan 15, og ein góðan tíma undan dystinum er hópurin á Svangaskarði, har dysturin byrjar klokkan 17.

Og tá eru upp móti eitt hundrað fólk, sum takast við okkurt annað enn tað, sum er nevnt oman fyri. T.d. politistalið og stórt tal av vaktum, bæði teimum sum syrgja fyri at bilarnir finna pláss, teimum sum selja atgongumerki, teimum sum standa inni á stadion og ansa eftir at alt gongur rætt fyri seg, ambulansutænaasta, brandmanalið og tey, sum kring vøllin selja kaffi og annað gott.

-nn-

26 ferðir í altjóða dysti

Tá føroyska landsliðið í annaðkvøld fer á grasvøllin á Svangaskarði at takast við grikkar, er tað fyrstu ferð, at dystur í EM undankappingini verður leiktur á Toftum. Allir føroyingar munnu minnast, hvussu tað gekst, tá FSF ætlaði at leika á Toftum í fyrru undankappingini. UEFA lat avgerðina upp í hendurnar á norðurírum, jugoslavum, og dønum. Norðurírar og jugoslavar søgdu nei, tí teir vildu leika undir somu umstøðum sum Eysturríki hevði gjørt tað í Landskrona.

Hóast danir góvu til kennar, at teir høvdu einki ímóti at koma til Føroyar, vórðu allir dystirnir leiktir í Landskrona, tí UEFA segði, at øll londini skuldu leika á sama vølli.

Síðani altjóða limaskapin í 1988 eru í alt 26 landsdystir leiktir, sum eru skrásettir hjá UEFA. Niðanfyri sæst, hvørjir teir eru.

nr.	dagur	staður	mótstøðulið	slag av dysti	úrslit [1]
1	24.08.1988	Akranes	Ísland	vinardystur	0-1 (0-1)
2	14.04.1989	Havnin	Kanada	vinardystur	1-0 (1-0)
3	16.04.1989	Klaksvík	Kanada	vinardystur	0-1 (0-0)
4	08.08.1990	Havnin	Ísland	vinardystur	2-3 (1-1)
5	12.09.1990	Landskrona	Eysturríki	1. EM	1-0 (0-0)
6	10.10.1990	Keypmh.	Danmark	2. EM	1-4 (1-2)
7	01.05.1991	Belfast	Norðurírl.	3. EM	1-1 (0-1)
8	16.05.1991	Beograd	Jugoslavia	4. EM	0-7 (0-2)
9	22.05.1991	Salzburg	Eysturríki	5. EM	0-3 (0-2)
10	15.07.1991	Havnin	Turkaland	vinardystur	1-1 (0-0)
11	11.09.1991	Landskrona	Norðurírl.	6. EM	0-5 (0-3)
12	25.09.1991	Landskrona	Danmark	7. EM	0-4 (0-2)
13	16.10.1991	Landskrona	Jugoslavia	8. EM	0-2 (0-1)
14	08.05.1992	Bukarest	Rumenia	1. HM	0-7 (0-5)
15	13.05.1992	Oslo	Noreg	vinardystur	0-2 (0-1)
16	03.06.1992	Toftir	Belgia	2. HM	0-3 (0-1)
17	16.06.1992	Toftir	Kypros	3. HM	0-2 (0-1)
18	05.08.1992	Toftir	Ísrael	vinardystur	1-1 (1-0)
19	09.09.1992	Cardiff	Wales	4. HM	0-6 (0-3)
20	23.09.1992	Koczitse	Tjekkoslov.	5. HM	0-4 (0-1)
21	25.04.1993	Limasol	Kypros	6. HM	1-3 (0-2)
22	22.05.1993	Bruxelles	Belgia	7. HM	0-3 (0-1)
23	06.06.1993	Toftir	Wales	8. HM	0-3 (0-2)
24	16.06.1993	Toftir	Tjekkoslov.	9. HM	0-3 (0-3)
25	11.08.1993	Toftir	Noreg	vinardystur	0-7 (0-4)
26	08.09.1993	Toftir	Rumenia	10. HM	0-4 (0-1)

[1] Føroyar verða altíð nevndar fyrst í úrslitunum



Torkil Nielsen – her saman við tjekkiska landsliðsmálverjanum Petr Kouba hevur skotið tvey altjóða mál

Skorað 9 ferðir

Føroyar hava sínum 26 altjóða skrásettu dystum fingið tilsamans níggju mál, og málskjúttar okkara eru hesir:

Torkil Nielsen tvey
(Føroyar-Kanada 1989 og Føroyar-Eysturríki 1990)
Kári Reynheim tvey
(Norðurírland-Føroyar 1991 Føroyar-Ísrael 1992)
Uni Arge eitt
(Kypros-Føroyar 1993)
Jan Dam eitt
(Føroyar-Ísland 1990)
Todi Jónsson
(Føroyar-Turkaland 1991)
Allan Mørkøre
(Danmark-Føroyar 1990)
Kurt Mørkøre
(Føroyar-Ísland 1990)